## DAGSINS MEINING

# Við áramót

Árið, sum nú fer aftur um, hevur verið eitt hendingarríkt ár. Vit fingu nýtt landsstýri. Fullveldistilgongdin er fokin og í staðin er komin ein sjálvstýristilgongd, har ætlanin er at fáa eina breiða tjóðskaparliga semju um sjálvstýri Føroya og um uttanríkis- og trygdarpolitiskar heimildir. Tað tykist sum rættiliga breið semja er í politisku skipanini um hesa tjóðskaparligu kós. Hvussu endaliga úrslitið fer at síggja út vita vit ikki enn, tí samráðingarnar eru ikki lidnar. Vónandi koma partarnir til eina semju, sum ein breiður meiriluti av Føroya fólki kann taka undir við, so sleppast kann burturúr tí tyngjandi tjóðskaparpolitisku ósemju, sumnú leingi hevur darvað politiska arbeiðinum í Føroyum.

Búskaparliga kundi myndin havt verið ljósari. Tað gongur ikki betur enn væl i vinnulívinum. Orsøkirnar eru lágir fiskaprísir og bygnaðarligir trupulleikar. Hinvegin er ikki talan um kreppu, og samgongan hevur víst, at hon tekur trupulleikarnar í størsta álvara. Tað tykist tó, sum vinnulívið heldur tað ganga ov seint við at koma fram við tí vinnustrategi, sum kann nýtast í einum kreppufyribyrgjandi búskaparpolitikki. Vónandi hendur nakað skjótt á hesum øki.

Á útbúgvingar- og mentanarøkinum hevur verið lívligt tjak og lívligt virksemi og sjáldan hevur mentanarpolitikkurin fingið størri rúmd í miðlunum. Mentamálaráðharrin tók øll á bóli, tá hann í eini handavending legði út- og sjónvarp saman. Hetta var ivaleyst neyðugt og tíðin vil vísa, hvussu samanleggingin fer at ávirka fjølmiðlaøkið. Her er ivaleyst ein størri liberalisering á veg og vit kunnu bert vóna, at hendan liberalisering fer at gagna øllum fjølmiðlum – eisini bløðunum, sum jú ikki eru javnstett við almennu fjølmiðlarnar men sum hava sína týðandi uppgávu í okkara demokratiska samfelag. Almennu miðlarnir fáa milliónaupphæddir, sum lurtarar og hyggjarar hava lógásetta skyldu at rinda teimum. Onnur fólkaræðilig lond útjavna henda ójavna við eitt nú blaðútberingarstuðli út frá tí meginreglu, at bløðini eru eins týðandi mentanarberar og almennu loftmiðlarnar. Vónandi fer ein komandi mediukommissión at greiða hesar og aðrar átrokandi miðlaspurningar t.d. spurningin um, hvør ið skal eiga almenna sendinetið. Á heilsuøkinum er nýggja landssjúkrahúsið størsta einstaka hendingin og vónandi fara politikkarar at játta tað, sum raksturin fer at kosta – um ikki, er lítið vunnið.

Á altjóða pallinum hevur verið lítil friður. Kríggið í Irak, sum ongan enda tykist fáa, rembingarnar í eystureuropa, hungursneyðir, náttúrvanlukkur, hækkandi orkuprísir og ein skrantandi heimsbúskapur, ið er nær tengdur at metstóra hallinum á amerikonsku fíggjarlógini. Men glottar eru eisini. Hóast trupulleikar meta flestu serfrøðingar, at heimsbúskapurin fer at batna í 2005.

Føroyar eru komnar væl ígjøgnum tað árið, sum nú fer. Landið er ríkt, men tíðin er komin til,at politikkarar hyggja at, hvussu hetta ríkidømið er býtt. Alt fleiri føroyingar gerast eldri og tí er ein nýskipan av eftirlønarøkinum átrokandi. Her tykist tað, sum ein glotti er fyri framman og arbeitt verður við eini áhugaverdari skipan. Eydnast hetta í valskeiðinum, er tað einki minni enn eitt politiskt bragd. Vit fara nú inn í eitt nýtt ár. Eingin uttan Várharra veit, hvussu hetta nýggja árið fer at vignast, men vit eiga øll vónina um eydnu og framgongd. Vónin er alt og henni mugu vit ikki sleppa. Okkara tankar leita tí eisini til teirra, sum vegna sorg ella persónligar trupulleikar hava tungt við at varðveita vónina. Blaðið ynskir øllum Føroya fólki eitt gott og signað nýttár og takkar samstundis øllum, sum vit hava havt samband við fyri gott samstarv við vónini, at vit við framhaldandi góðum samstarvi kunnu geva føroyingum úti sum heima eitt enn betri blað í 2005.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvussu verður almennur peningur raðfestur?

**Róland Joensen**
*Kaldbak*

Sum kunnugt er stór náttúruvanlukka farin fram í Asiu, og havi eg fylgt gongdini har við stórum áhuga.

Hetta er ein okkum ókendur sorgarleikur. Nógv eru tey, ið hava mist bæði ognir og síni kæru. Eg meti tí, at tað er av størsta týdningi, at vit sum føroyingar veita eina hjálpandi hond, soleiðis sum vit nú einaferð kunnu tað.

Men tað, ið harmar meg hesum viðvíkjandi, er mátin vit raðfesta pening okkara. Alt gott um at vit hjálpa øðrum, men hvat við okkara egnu.

Tað vísur seg ferð eftir ferð, at hava tey veiku í okkara samfelag tørv á einhvørjari hjálp, so er peningur ikki tøkur til hetta. Eitt dømi er tað stóra arbeiði Frelsunnar Herurin ger, og øll vita eisini at tílíkt arbeiði er sera kostnaðarmikið. Eisini er flest øllum kunnugt, at ikki er nóg mikið av peningi tøkur til hetta arbeiði. Hví er tað ikki eins lætt at útvega peningin til tílíkt arbeiði?

Ella hvussu ber tað til at peningur ikki er tøkur til tey í samfelagi okkara, ið hava tørv á tí, – eitt nú pensjónistar, ið gjøgnum árini hava ligið í fíggjarligum andaleypi? Ein hevur skilt tað soleiðis, at møguligt var ikki at játta meiri pening, orsaka av sparingum og øðrum. Hetta kann tó ikki vera rætt, tá ið millióna upphæddir altíð eru tøkar til at senda av landinum, til at hjálpa øðrum.

Mong eru tey, ið ikki klára dagin og vegin, ikki tí at tey eru verri menniskju enn onnur, men hjálp er eingin til teirra? Nógv eru tey, ið hava tað óhepnu lagnu, at tey gerast sjúk, missa hjúnafelagan ella annað, ið ger at tey missa inntøkugrundarlagið. Hví kunnu vit ikki hjálpa hesum, ið eru okkara egnu, meiri enn vit gera?

Heldur eingin vilji er til at játta tann pening, ið tørvur er á til sjúkrahúsverkið, tí sparingar skulu gerast. Heimahjálpin til okkara gomlu er eins og maður við ongum ørmum. Hví ikki hjálpa teimum, ið hava bygt hetta land?

Eg vil ikki at hetta skal misskiljast, tí eg havi einki í móti at hjálpa øðrum, har tað er neyðugt. Men eg meti tað vera sera harmiligt at hoyra politikarar okkara, gera so nógv burtur úr, tá ið tað kemur til at hjálpa øðrum, ið ikki hoyra samfelagi okkara til, er hetta ein máti at vísa seg farm uppá, og fáa bíliga politiska reklamu?

Hevði ynskt at teir vóru eins grammir, tá ið tað kom til at játta pening til okkara egnu veiku, – og at tað hevði gingið líka skjótt.

# Uppskot til Reyða Kross

**Bjørn Patursson**

Nú eg sitið og hugsi um, hvussu nógvur peningur verður skotin av gamlárskvøld, kom eg at hugsa um, at eg í staðin fyri at keypa fýrverk fari at senda Reyðakrossi eina peningagávu. Hugsið tykkum, hvønn munin tað hevði gjørt, um hvør føroyingur læt eitt 10 krónu stykkið í staðin fyri at hvørja sendu rakett. Tað hevði munað, og vit kundu goymt fýrverkið til komandi ár. Kommunurnar brúka eisini munandi peningaupphæddir til fýrverk.

Gott nýggjár!

# Onki nýggjársbál uttan loyvi

**Onki nýggjársbál skal kyndast uttan við loyvi frá kommununi. Tað er bert loyvt at brenna óviðgjørdan við**

TÍÐINDASKRIV
*Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Umhvørvisdeildin*

Tað er ikki loyvt at brenna bál, herundir nýggjársbál, uttan við loyvi.

Sambært kunngerð nr. 147 um burturkast frá 19. oktober 1995 verður loyvi til at brenna nýggjárs- og jóansøkubál o.t. latið av kommununi, um tað ikki er til ampa fyri grannalagið.

Um bál elva til ampa, skal kommunustýrið geva boð um, at gevast skal við hesum, og at burturkastið skal latast til kommunalu móttøkustøðina fyri burturkast.

### Hvat kann brennast á nýggjársbálinum

Tað er bert loyvt at brenna óviðgjørdan við. Til dømis kunnu granntrø ella jólatrø brennast.

Javnan hevur nýggjársbálið verið nýtt sum høvi til at sleppa sær av við ymiskt burturkast og annað órudd, sum hevur hópað seg upp gjøgnum árið. Hetta kann vera sera óheppið, tí nógvur og eisini vandamikil roykur kann koma frá dálkandi burturkasti. Tað er ikki loyvt at brenna viðgjørdan við, tvs. við, sum er trýstviðgjørdur, og eisini við, sum er málaður ella viðgjørdur á annan hátt.

Leivdir frá bálum skulu takast upp skjótast tilber og latast til kommunalu móttøkustøðina fyri burturkast.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.